# samfelag


Vakurt landslag

sum vita, at tað kemur upprunaliga frá Sleat, har Mac Donald ættin so ella so eigur stóran part av oynni.

Sleat er eitt mentunarliga virkið økið, eisini tá ið tað snýr um festivalar! Tað er ein Skyefestivalur her, sum varar heilar tvær vikur, frá 13. til 27.juli. Tey sum hava áhuga kunnu fara inn á heimasíðuna: www.skyfestival.com

## Skúlagongd

Í Bretlandi yvirhøvur fara børnini í skúla fimm ára gomul, og tey ganga í grundskúla, til tey eru 12 ára gomul. Tað er annars ikki allir føroyingar, sum halda hetta vera so skilagott. Havi hoyrt sum føroyska familju i Bretlandi, sum er flutt til Føroyar fyri at sleppa undan at koyra børnini so tíðliga í skúla.

Á Sleat er ein skúli fyri alt økið, og her ganga eini 60 børn. Vit tosaðu vit yvirlæraran á skúlanum. Nú hevur so nógv verið tosað um orsøkina til, at tað er so trupult at fáa skúlaleiðarar í Føroyum. Ein orsøk sigst at vera lønin. Vit hava gjørt lærarafelagnum tann beina at kanna, hvør munur er á einum lærara og einum yvirlærara á einum slíkum skúla. Fyrstilærarin fær 44.000 serling pund árliga, meðan hægst lønti lærarin fær 33.000. Viðbótin er tískil ein triðingur og tykist at vera hægri enn í Føroyum.

Annars stóð at lesa í bløðunum, at børnini í skúlanum í Sleat hava skipað fyri tiltøkum at útvega hjálp til børn í Afganistan, so her hugsa tey eisini um onnur.

Við 12 ára aldur verða øll børn á oynni send til ein felagsskúla í høvuðsbýnum Portree, har tað eru umleið 600 næmingar. Hetta merkir, at farast skal við bussi, og hetta kann væl taka ein tíma ella longri hvønn vegin.

## Politikkur

Fyri kortum hevur verið val til skotska tjóðartingið og til lokalu býarstýrini, og hetta var eitt gott høvi til at spyrja fólk um teirra politisku støðu. Hesin partur av Skotlandi plagar vanliga at stuðla tí liberala flokkinum til parlamentsval, eins og tey gera í Hetlandi og Orknoyggjum. Men tað nýggja við hesum valinum var, at SNP, skotski tjóðskaparflokkurin, rættiliga hevur fingið vind í seglini og gjørdist tann størsti flokkurin í skotska tinginum. Hetta er ein støða, sum Labour nærum hevur havt einarætt til árini frammanundan. Hetta er eisini endað við, at SNP hevur fingið sessin sum "løgmaður" takkað veri stuðul frá teimum tveimum grønu tinglimінum. Tað verður tó mett, at flokkurin fær tað trupult, tí hann hevur ikki meiriluta aftanfyri seg og noyðist at arbeiða við skiftandi meirilutum. Arbeiðið kann koma meira at snúgva seg um dagligar trupulleikar, heldur enn um sjálvstýri og loysing. Men hetta er ein politisk kollvelting kortini.

Á samkomuni fyri innbodnum hittu vit fleiri, sum av heilum huga stuðlaðu skotska tjóðskaparflokkinum og einum sjálvstøðugum Skotlandi, tó innan tað bretska kongahúsið.

Hóast Skotland hevur eitt sag av sjálvstýri, hava teir kortini sera lítið at siga. Til dømis hevur tingið nærum onga ávirkan á skattir og gjøld, sum verða latin til tað almenna. Skattur verður eisini goldin benleiðis til London, sum so sendir peningin aftur til Skotlands sum ein blokk at býta út aftur. Vit kenna ikki tølini fyri Skotland, men tá ið FF-blaðið var í Hetlandi fyri einum góðum ári síðani, varð upplýst, at teir fingu minni av peningi aftur úr London, enn teir sendu hagar. Teir nýtast tí ikki at hava samband við Ongland av fíggjarligum ávum. Her man oljan telja nógv, og tað ger hon eisini hjá Skotlandi yvirhøvur.

Eitt, sum eisini øsir skotar, er at bretsku kjarnokruvápini verða goymd í Skotlandi, meðan ein møgulig avgerð um at nýta tey verður tikin í London. Her merktist eisini andstøðan móti Tony Blair og hansara Labour flokk vegna Irakkríggið, sum tey halda tykist vera meira og meira høpisleyst.

## Blaðútgáva

Tað finst eitt blað, sum verður givið út á Isle of Skye, og tað eitur West Higland Free Press, sum er byrjað fyri 35 árum síðani, og tað kemur út eina ferð um vikuna. Blaðið er 32 síður og hevur nakað sama tilfar, sum vit kenna frá okkara bløðum millum annað við nógvum ítrótti. Onkrar greinir eru skrivaðar á gæliskum.

Onkur áhugaverd fiskivinnutíðini eru eisini. Sum til dømis um eitt rækjutrol, sum kann skilja óynskta hjáveiðu burtur úr.

Í onkrari grein verður fýlst at tí vánaliga flogsambandinum, sum tey hava. Her er gingið aftur á, tí tað flogsamband, sum tey høvdu varð niðurlagt fyri 20 árum síðani. Nærmasti altjóða flogvøllur er Aberdeen, og hagar tekur tað minst fýra tímar í bussi, og tá verður tað nokk so strævið.

Nærmasti stórbýur er annars Inverness, har tað eisini er flogvøllur til innanlands flúgving.

Annars verður sagt, at tá ið konufólkið rættuliga skala fara til handils, fara tær til Inverness, og hagar man tað taka einar tveir tímar við bili.

## Sunnudagurin verður hildin heilagur

Sunnudagurin verður hildin heilagur. Inntil fyri kortum var næstan alt stongt sunnudag, ja, sjálvt lokala burgarabarrin var stongd. Bussar koyrdu ikki og ferjur sigldu heldur ikki ella nærum ikki. So hjá teimum, sum ikki høvdu bil, bar illa til at ferðast. Í 2000 var uppá tal at hava eina fólkaatkvøðu um spurningin, men hon hevur ikki verið enn. Men gongdin er kortini tann, at meira og meira er loyvt sunnudag. Sagt verður, at á grannaoynni Lewis eru tey enn meira konservativ á hesum økinum.

Tað eru tvær kirkjur í Sleat. Tær hava tvinnar gudstænastur sunnudag. Onnur er á enskum og hin á geliskum. Mikudag er gudstænastan á báðum málum.

## Gott ferðamál

Niðurstøðan av hesi grein er, at hjá tí, sum kortini fer til Skotlands at ferðast, er ein avstingari til Isle of Skye ein sjálvfylgja.


*Millum undirhaldið var sjálvsagt eisini sekkjapípa*


*Tíð var eisini at síggja seg um. Her síggja vit Jógvan á Lakjuni, Jákup Mikkelsen, Elsa Maria Olsen, Árni Dahl, Marianna Debes Dahl og Elin Súsanna Jacobsen*


*Útsýni frá hotellinum*


*Tá vitjað varð á ognini hjá Mac Donaldsættini hitti Óli Breckmann tilvildarliga Maggi Mac Donalds, sum hann kendi frá sín lestrartíð í Bretlandi. Hon er nú komin heim aftur til "fedranna arv".*